# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Orð og gerð

Í mánaðir hava politikkarar og embætisverk sitið hendur í favn, meðan kreppan hevur fløtt inn yvir okkum. So knappliga raknar alt við. Avvarandi partar viðurkenna, at vit eru á veg inn í ta búskaparkreppu, ið kemur í kjalarvørrinum á altjóða fíggjarkreppuni. Landsbankin, sum er ein hin fremsti ráðgevi hjá løgtingi og landsstýri, er mestsum hamskiftur. Frá nærum at bagatellisera altjóða fíggjarkeppuna og hennara árin á okkara búskap blunka nú allar ávaringarlampurnar. Nú metir landsbankin, at BTÚ kann falla við 3-5% í 2009, og at fallið í 2010 møguliga verður 1-6% í mun til verandi ár. Arbeiðsloysið fer at vaksa til 4% í ár og sama rák er í okkara grannalondum. Hetta ger, at føroyingar, sum missa arbeiðið, ikki sum vant kunnu søkja sær arbeiði í grannalondunum. Nú er so álvarin gingin upp fyri teimum, sum stýra og ráða – vaknað við kaldan dreym, hava tey sannkent kreppuna.

Tað er er órættvíst at siga, at tey, sum stýra og ráða als ikki vita síni livandi ráð í hesi støðu, sum mestsum hevur tikið løgting og landsstýri á bóli. Síðan kreppan varð sannkend, hevur ikki trotið við hugskotum at byrgja fyri, at kreppan versnar og at venda vandamiklu gongdini. Vit kunnu fyri at nevna nøkur dømi vísa á uppskot um at skerja almanna- og onnur øki, at minka ella avtaka sjómannafrádráttin, at minka um rentustuðulin til sethúsabygging, at steðga lønarvøkstri við lóg, at seta lønir niður, at innføra tilfeingisgjald í fiskivinnuni o.m.a. áhugavert. Tað, sum ikki er minni áhugavert, eru øki, ið ikki verða nevnd. Lítil og eingin áhugi er fyri at nema við skatta- og avgjaldspolitikkin og bert fáur nevnir blokkin. Tað tykist heldur ikki, sum tey, ið stýra og ráða, hava gjørt sær nakrar tankar um almennu íløgurnar sum kreppufyribyrgjandi amboð eins og áhugi ikki tykist vera fyri teimum møguleikum, sum stóru almennu grunnarnir hava sum kreppuamboð.

Samantikið tykjast hugskotini ikki at tróta. Sama kann ikki sigast um viljan og evni at seta hugskot í verk. Sum so ofta í føroyskum politikki er ikki samanhang millum orð og gerð. Tað er væl skiljandi, at hugurin at seta hesi tiltøk í verk er lítil. Tiltøkini eru øll uttan undantak sera illa umtókt millum manna. Hetta man vera orsøkin til, at fáur mælir til ítøkilig tiltøk. Undantøkini eru t.d. Anfinn við sínum lønarsteðgi, Jóannes, sum nevnir kamelar, ið skulu svølgjast og Torbjørn, sum minnir á, at øll hava ábyrgd av standinum. Hví hendir so einki? Svarið liggur beint fyri fótunum. Vit hava ikki bert búskaparkreppu – vit hava eisini leiðslukreppu. Landsins evsta fyrisitingarliga leiðsla tykist ikki hava nakað boð uppá eina ítøkiliga kreppustrategi. Hevur entá róð framundir, at her er eingin kreppa. Løgmaður og varaløgmaður eru mest sum ósjónligir í hesum høpi. Teir hava latið øðrum vøllin, og eingin hevur nakra hóming av, hvussu samgongan ætlar at bjarga samfelagnum frá stóra skrædlinum. Nú er tíð at stíga í karakter, at vísa leiðslu og savna allar góðar kreftir og at fara til verka, áðrenn ov seint er.

**Sosialurin**

## Ein kann ikki royta eina skalluta hønu



JÓNA MORTENSEN

Havi júst lisið skrivið hjá Rolf Guttesen í Sosialinum við heitinum »Í Havn er støðan hjá teim eldru, sum krevja røkt, ikki góð«. Sera væl skrivað grein.

Hann nevnir, at tað kann ikki vera rætt, at ein skal til at skera á eldraøkinum, sum heldur átti at verið útbygt til at nøkta tørvin, ið longu er á hesum forsømda øki. Eg má geva honum rætt, hvussu kann ein so mikið sum hugsa um at gera sparingar innan eitt økið, sum er so forsømt? Skuldi alt ikki blíva betri innan eldraøkið? Eg veit væl at tað er kreppa, men tú kanst ikki royta eina skalluta hønu. Í minari verð er tað burturvið, so mikið at hugsa um at spara innan eldraøkið. Okkara gomlu skulu hava eitt virðiligt lív, tað hevur verið havt frammi óteljandi ferðir. Røktarheim skuldu byggjast, ein skjóttarbeiðandi nevnd skuldi fara í gongd alt fyri eitt at finna útav, hvussu hettar forsømda álvarsmál skuldi loysast. Hvussu langt man henda »skjóttarbeiðandi nevnd« vera komin? Fólk vilja vita, hvussu leingi tey skulu vænta at bíða, til nakar bati verður.

Bíðilistarnir eru langir, og fólk hava mist mótið, tey orka ikki meira, tað hoyri eg um hvønn dag. Bara á tí akutta bíðilistanum eru yvir 100 fólk, og hin listin er umleið tríggjar ferðir so langur. So tað munar ógvuliga lítið við teim 32 røktarheimsplássunum, sum ætlanin er at byggja yviri við Strond. Ein má fyrihalda seg til veruleikan og arbeiða skjótt við at finna eina loysn.

Mín vón er, at nakað munagott hendir, heilt skjótt, við røktarheimstrupuleikunum, tí sum nú er, kann tað ikki halda áfram.

## Um at gita ella vita



HJALTI Í JÁKUPSSTOVU

Gerhard Lognberg, løgtingsmaður, segði í Løgtinginum 14 apríl 2009, at almennir stovnar skifta navn fyri milliónа - upphæddir, og, sum eg skilti hann, var tað millum annað hetta, sum fekk landið at fara av knóranum.

Tá Havstovan, fyrr Fiskirannsóknarstovan, skifti navn og helt 50 ára dag 2 apríl í ár, giti eg, at tað er hetta, Gerhard Lognberg sipar til.

Fyri at hann og Føroya fólk skal vita og ikki gita, hvat hetta navnaskiftið og føðingardagshald kostaði, eru útreiðslurnar í hesum sambandið settar út í talvuna niðanfyri.

Sum tað sæst, so eru hesar útreiðslurnar neyvan orsøkin til stóra hallið á fíggjarlógini.

Starvsfólkið á Havstovuni stóð fyri øllum haldinum. Kokkurin á Magnus Heinason bakaði drýl, starvsfólkini bæði smurdu, løgdu viðskera á, settu á borðið, bjóðaðu og ruddaðu av. Alt varð gjørt, fyri at haldið skuldi verða so gott sum gjørligt, og fyri at kostnaðirnir blivu so rímiligir sum gjørligt. Tað er tí hugstoytt, at landsins hægsti røðarapallur verður nýttur til at leggja eftir almennum starvsfólkum, sum gera sítt besta, heldur enn at viðgera veruliga politikkin, millum annað vantandi stýring av fiskiskapinum, ið hevur ført landið í óføri.

Uppgerð av 50 ára haldi á Havstovuni

| | |
|---|---|
| KREA (navn, búmerki) | 30.000 u.mvg. |
| Matur vm. | |
| Leiga av service | 953 |
| Matur | 2.448 |
| Drekkivørur | 3.422 |
| Blómur og prýði | 410 |
| **Íalt** | **7.233 v.mvg.** |

## Alt við tað gamla?

Á Borgarafundinum fyrr í ár, har bráðfeingistørvurin hjá røktarkrevjandi í Tórshavnar kommuni varð viðgjørdur, góvu Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna, og Heðin Mortensen, borgarstjóri, hvør øðrum og fundarfólkunum lyfti um, at nakað skuldi henda skjótt við hesi søk.

Men staðfestast má, at:

**1.** Enn hevur borgarin einki hoyrt um nakra ítøkiliga ætlan fyri, hvussu hesin stóri trupulleiki skal loysast.

**2.** Trupulleikin stendur við og bara versnar fyri hvønn dag, ið fer.

**3.** Borgarstjórin boðaði fyri tíð síðan frá, at eitt hús, ið kundi hýsa 50 fólkum, skuldi fáast til vega. Síðan er einki meira frætt um hetta mál.

Eitt ófrávíkiligt krav er, at tey, ið hava hjálp fyri neyðini og avvarðandi teirra, hava krav upp á at vita, hvussu gongur við hesi ætlan, ella um nakað annað er í umbúna!

Tórshavnar kommuna hevur verið fólkavald kommuna í 100 ár. Nógv verður gjørt burturúr, og fjøltáttað tiltøk eru á skránni alt árið. Vónandi fer eisini at dryppa á okkara røktarkrevjandi borgarar, tá ið ráð eru til so mong onnur góð tiltøk í ár!

Átti aðalmálið hjá kommununi ikki at verið, at allir borgarar skulu hava virðiligar umstøður at búleikast í?

Ella man alt vera við tað gamla enn?

Kemur einki nýtt fram skjótt, verður kallað inn til nýggjan borgarafund, har avvarðandi politikkarar verða bodnir við til at greiða frá, hvat er hent síðan seinasta fundin.

**Daisy Sloan**
**Jóna Mortensen**
**Sigrún Mohr**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.